**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag. Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli



TÍÐARGREININ
*Brandur Sandoy*

# Borgarstjórin á Sandi er fíggjarliga ábyrgdarleysur

**Góðu borgarar á Sandi!**
Sum tit vita, hevur órógv verið seinastu dagarnar á politiska pallinum á Sandi.

Fýra bygdarráðslimir, har eg eri ein teirra, hava sent borgarstjóranum eitt bræv viðvíkjandi ónøgd okkara við leiklut hansara, umboðandi breiða samstarvið í Sands Kommunu.

Hetta bræv varð ætlað borgarstjóranum til støðutakan, men sum flestu tykkara vita, so hevur brævið ligið frammi til skoðan heima hjá borgarstjóranum. Ikki nøkrum at siga frá er hetta sera óheppið, men gevur bert eina orsøk afturat at boða frá, at álit mítt á borgarstjóran umboðandi okkum øll í kommununi er rokið.

**Samstarvstrupulleikar**
Brævið, ið var ein áheitan á borgarstjóran at lata sessin frá sær, var grundað á samstarvstrupulleikar, sum hava verið síðani nýggja kommunustýrið tók við 1 januar 2009. Latið var upp fyri møguleikanum at tað breiða samstarvið í kommununi kundi halda áfram, um so var, at borgarstjórin lat sessin frá sær. Alternativið var, at vit fýra, sum ritaðu undir brævið, tóku okkum saman í valbólk.

Yvirfyri borgarstjóranum hildu vit, at útgreinaðar orsakir vóru óneyðugar, eftirsum hann veit, hvørjir hesir samstarvstrupulleikar eru. Høvdu vit vitað, hvussu borgarstjórin handfór brævið, høvdu grundgevingarnar sjálvandi verið útgreinaðar, so tey sum lósu brævið fingu hesar grundgevingar beinanvegin. Skal tí hervið royna at greiða frá, hvat liggur til grund fyri míni støðutakan, við at heita á borgarstjóran um at leggja frá sær.

**Fekk sær egnan vinning**
Í røttum samstarvsanda avtalaðu vit at hava regluligar samstarvsfundir. Á fyrsta samstarvsfundi valdi borgarstjórin m. a. at taka fram málið um setanarbrøkin hjá sær sjálvum. Hann vildi hava, at borgarstjórastarvið varð fulla tíð. Sjálvur var eg millum teirra, sum mæltu frá, við tí úrsliti, at undirtøka ikki fekst hjá nývalda kommunustýrinum fyri, at setanarbrøkurin hjá borgarstjóranum skuldi hækka.

Nakrar dagar seinni stendur at lesa í bløðunum, at borgarstjórin sjálvboðin hevði ofrað sína lønarhækking fyri at tilhaldið kundi halda áfram. Hetta at borgarstjórin fekk sær egnan politiskan vinning upp á ryggin av restini av kommunustýrinum, var byrjanin til ónøgd mína við borgarstjóran. Sjálvt um eg vísti á mína ónøgd í hesum máli, valdi eg at tiga, fyri ikki at seta kílar í samstarvið.

**Viðurkennir ikki gegnistrupulelikar**
Eftir henda samstarvsfund byrjaði eg at merkja, at borgarstjórin mótarbeiddi mínum leikluti sum formaður í Vinnu- og Tøkninevndini. Á samstarvsfundum førdi hann m.a. fram, at eg ikki kundi seta ymisk viðkomandi mál á dagsskrá í nevndini, uttan at borgarstjórin fyrst skuldi siga gott fyri, at nevndin kundi sleppa at umrøða hesi mál. Henda støða tóktist mær heilt absurd, tí hvat skal nevndin so vera til, uttan at viðgera tey øki, sum sambært kommunustýrisskipanini hjá Sands Kommunu liggja undir henni?

Eitt annað, sum liggur til grund fyri míni støðutakan, er tann vantandi eginleikin hjá borgarstjóranum at viðurkenna sínar gegnistrupulleikar. Tá man situr í einum slíkum sessi, sum kommunustýrið er, skal man verða eyka varin við at nærkast markinum viðvíkjandi gegni, tí ivin verður altíð vendur ímóti einum. Sum dømi meti eg tað sum heilt natúrligt, at eg við míni fyritøku, ikki bjóði upp á arbeiði hjá kommununi, so leingi sum eg siti í kommunustýrinum.

**Konan í leiðarastarv**
Tá leiðari fyri barnaverndina skuldi setast, hevði borgarstjórin eftir mínum tykki eina sera óhepna hond við í spælinum, har hann sjálvur var við at taka avgerð um, at tað ikki skuldi søkjast av nýggjum eftir leiðara, eftir at tann sum fekk starvið tók seg aftur. Tað sum ger, at hetta er serliga óheppið, er at ivi kann seta um gegnið hjá borgarstjóranum við hesi avgerð, tí at henda avgerð bar við sær, at hansara egna kona fekk starvið ístaðin. Hetta er ein støða, har metast má, at borgarstjórin var betri farin við at biðja varamann sín koma í sítt stað, fyri at ongin ivi skuldi ráða um hansara gegni.

Her skal sigast, at eg eri ótrúliga harmur at noyðast at nevna konu borgarstjórans í hesum sambandi. Kenni hana bara sum eina arbeiðssama og raska kvinnu. Vil eisini fegin vísa á, at atfinningar mínar einans eru rættaðar eftir borgarstjóranum.

**Persónlig fíggjarlig áhugamál**
Tá tað almenna slepti endanum viðvíkjandi tilhaldunum kring landið, legði borgarstjórin uppskot fyri kommunustýrisfundin um, at Sands Kommuna skuldi játta ávíst krónutal, so at tilhaldið kundi halda áfram sum áður. Undirtøka fekst ikki fyri hesum máli, tí málið varð ov illa lýst, og var tað tí beint í Trivnaðarnevndina til at fáa sett eina fíggjarætlan upp. Síðani kom málið fyri aftur á fundi og varð samtykt.

Borgarstjórin hevur verið við til allar hesar viðgerðir, sjálvt um kona hansara er leiðari í tilhaldinum, og sjálvt um vit fýra, sum hava ritað undir brævið, gjørdu borgarstjóran varugan við, at hann hevði persónlig fíggjarlig áhugamál í málinum. Heldur ikki her vildi hann kennast við sítt ógegni.

**Kreditorar standa í kø**
Sands Kommuna hevur tveir limir í Stýrinum fyri Meginskúlan, Fríða Nolsøe og undirritaða. Á fyrsta stýrisfundi vóru vit gjørdir varugir við, at Sands Kommuna skyldar Meginskúlanum nógvar pengar. Sjálvur gjørdi eg eitt upprit og legði fram fyri samstarvsfund í kommununi, hvørji viðurskifti áttu at verið dagførd og broytt, og vit báðir Fríði gjørdu greitt, hvørja upphædd vit skylda, og at eftirstøðan økist støðugt.

Borgarstjórin sat sjálvur annar í Skúlasambandinum undanfarna skeið, og hevur hann tí verið við at lagt fíggjarætlanina hjá Meginskúlanum og lagt rygg til eina møguliga meirnýtslu. Borgarstjórin førdi fram, at trupulleikin var, at fíggjarætlanin hjá Meginskúlanum var løgd eftir at fíggjarætlanin hjá kommununi var liðug. Tí var gjaldið hjá Sands Kommunu minni, enn fíggjarætlanin hjá Meginskúlanum vísti, at tað burdi verið. Ført varð fram av mær, at støðan var óhaldbar, og at man kom at renna seg ímóti einum múri. Borgarstjórin lovaði at arbeiða við at finna fleiri pengar. Síðani hoyrdist onki aftur.

Tá Kommunan í vár noyddist at taka upp lán á 2,5 mió.kr, fyri at gjalda kreditorum, skuldi eykafíggjarætlan gerast, og hevði hetta verið eitt gylt høvi at tikið støðuna hjá Meginskúlanum upp í hesa ætlan. Men hóast málið varð umrøtt, og limirnir royndu at fáa borgarstjóran at boyggja seg til at hækka játtanina til Meginskúlan, setti hesin harðliga uppá og lovaði høgt og heilagt, at hann skuldi taka sær av málinum og fáa fund í lag við Skúlasambandið um fíggjarligu støðuna hjá Meginskúlanum.

Nú hálvt ár seinni er onki hent. Eftirstøðan hjá Sands Kommunu kemur við árslok 2009 at verða uml 1,1 mió kr. Meginskúlin er í ferð við at steðga upp av kapitaltroti. Kreditorar standa í kø og bíða eftir pengum.

**Heldur skúlabørn sum gíslar**
Hetta er eitt mál, sum borgarstjórin lovaði at taka sær av vegna kommunustýrið, serliga av tí, at skuldin stavar frá tí tíðini, hann hevur verið stýrislimur fyri Meginskúlan og borgarstjóri samstundis, og har hann hevur steðgað inngjøldunum til Meginskúlan í ávísum tíðarskeiðum í 2007-08 við tí avleiðing, at eftirstøðan bara er vaksin og vaksin. Hann hevur skumpað henda bóltin framman fyri sær, og er bólturin bara vorðin størri og størri. Høvdu pengarnir verið settir til síðis, so teir vóru tøkir nú, hevði støðan veri einkul. Mær kunnugt eru teir ikki tað, og kommunukassin tolir neyvan so stórt inngreb sum 1,1 mió.kr.

Alt hetta boðar frá, at borgarstjórin er fíggjarliga óansvarligur, klárar ikki at finna semjur í einum breiðari oyggjahøpi, og hevur ongar trupulleikar við at halda skúlabørn úr allari oynni sum gísla í einum máli fyri kanska at kunna trýsta onkra av hinum kommununum í øðrum samanhangi. Tað sigur seg sjálvt, at sum fíggjarliga ábyrgdarfullur persónur, kann eg ómøguligt góðtaka, at slíkt heldur áfram.

Eg kundi komið við fleiri atfinningum, tí listin er langur. Tað verður tó ikki á hesum sinni. Haldi eisini, at hesi dømini tala fyri seg sjálvi.

Um vit hyggja frameftir, standa stórar avbjóðingar fyri framman. Hesar avbjóðingar krevja, at vit duga at stýra okkara fíggjarviðurskiftum, at vit í góðum samskifti og samstarvi við restina av oynni duga at røkka teimum felagsmálum, sum upp á sikt gagna okkum øllum í oynni, og at borgarin kann hava álit á, at tey sum ráða, duga at taka dagar ímillum, nær ið skeggið er ov nær høkuni. Tí meti eg ikki, at eg framhaldandi kann stuðla borgarstjóranum í hansara virki.

Allar avgerðir fáa avleiðingar, og fer henda avgerð mín helst eisini at fáa avleiðingar fyri meg og míni. Tað léttasta hevði sjálvandi verið at fylgt leiðaranum ígjøgnum tjúkt og tunt. Samanbera vit okkum við eitt seyðafylgi, sum stendur ytst á eini trom, og leiðarin í fylginum sigur »loyp«, so loypa allir seyðirnir útav eggini í hølunum á leiðaranum.

Í hesi støðu eiga vit at skilja okkum frá teim ferføttu, og hugsa sjálvi.



Tíðargreinin